## DAGSINS MEINING

# Tveir altjóða trupulleikar

Um vikuskiftið varð friðarvirðisløn Nobels handað stjóranum fyri altjóða kjarnorkustovninum. Hetta var ein sera skilagóð avgerð. Stjórin El Bahradai helt áhugaverda takkarrøðu, har hann vísti á, at tað sjálvsagt ikki var hann persónliga, men stovnurin ella felagsskapurin, sum átti heiðurin. Bahradai vísti í røðu síni á tveir megintrupulleikar ella vandar í heiminum í dag, tá um kjarnorku ræður. Fyrsti trupulleikin er, at kjarorkutilfar í stórum mongdum verður flutt ólógliga landa millum. Her er talan um beinleiðis smugling, har altjóða brotsmannalið vinna stóran pening. Mangan er her talan um kjarnorkutilfar, sum stavar frá gamla Sovjetsamveldinum. Stjórin gjørdi vart við, at hetta óskil eigur at verða steðgað skjótast, tí hetta ger heimin sera ótryggan. Hetta merkir, at í roynd og veru vita avvarandi altjóða myndugleikar ikki, hvussu nógv vandamikið geisslavirkið tilfar veruliga er í umfari. Heldur ikki vita teir, hvussu nógv av hesum tilfari kann fara í ólógligt umfari næstu árini. Hetta er sostatt ein stórur altjóða trupulleiki.

Hin megintrupulleikin, sum Bahradai vísti á, snýr seg um spjaðingina av kjarnorkuvápnum. Hetta merkir, at alt fleiri lond útvega sær ella gerast før fyri at út vega sær kjarnorkuvápn. Hetta hendir á lóligan hátt. Men tað merkir ikki, at vandin er minni. Jú fleiri lond, ið útvega sær kjarnorkuvápn, jú størri gerst vandin fyri, at hesi vápn verða nýtt í eini altjóða konflikt, er minni. Hetta vil so aftur leiða til eina heimsumfevnandi kjarnorkuvanlukku. Eitt kríggj, har kjarnorkuvápn verða brúkt, kann ikki avmarkast. Hvussu so víkur og vendir, so fer útlátið av geisslavirkni at verða so ógvusligt, at øll mannaættin kemur í stóran vanda. Eisini her er sostatt ein stórur vandi á ferð og ein álvarsamur altjóða trupulleiki.

Stjórin fyri altjóða kjarnorkustovninum IAEA vísti á, at tað tykist, sum eingin longur veruliga og í fullum álvara tekur sær av hesum báðum stóru altjóða trupulleikum. Stríðið móti altjóða yvirgangi fyllir so nógv í huganum á heimsins mætastu tjóðum og teirra leiðarum, at pláss er ikki longur fyri hesum "gamla" altjóða trupulleikanum. Tað var tann tíð, tá ið heimsins leiðarar skiltu vandan við eitt nú spjaðing av kjarnorkuvápnum. Nú venda teir blinda eyganum móti hesum vanda. El Bahradai endaði røðu sína í Oslo við at heita á heimsins tjóðir um at taka hesar vanda í størri álvara og at sýna hesum altjóða trupulleikum størri ans. Vit onnur kunnu bert bíða og vóna, at lurtað verður eftir hesum skilamanni, so vit sleppa frá vandanum fyri eini heimsumfatandi kjarnorkuvanlukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jólaheilsan til Heðin

**Betur at borgarin hevur ráð at geva jólagávur, heldur enn at Heðin gevur jólagávur, sum onnur hava goldið**

**Jan Christiansen**
*býráðlimur*

Heðin Mortensen roynir enn einaferð at verja meirilutans avgerð um at hækka skattaprosentið í Tórshavnar Kommunu komandi ár. Hann roynir at niðurgera undirritaða, við at siga, at eg lítið og einki skilji, og sigur hann seg vilja skera prinsippið um innkrevjing av skatti út í papp, so at eg kann skilja tað. Eisini sigur Heðin, at um skattaprosentið ikki skal hækkað komandi ár, so mugu vit í minnilutanum siga, hvørjar tænastur vit vilja velja frá. Heðin skrivar at kommunulógin er púra greið, og at í henni stendur, at kommunan hevur bert loyvi at krevja tað inn í skatti, sum tað kostar at reka kommununa, hvørki meira ella minni.

Lat meg nú royna at skera fíggjarætlanina hjá Tórshavnar Kommunu fyri 2006 út í pappi fyri Heðini.

Á býráðsfundi 24. november í ár bleiv fíggjarætlanin fyri komandi ár samtykt, og vóru høvuðstølini hesi:

**Útreiðslur**:

| | |
|---|---|
| Fyrisiting | 45.520.000 kr. |
| Tekniskar veitingar | 90.130.000 kr. |
| Skúlamál | 37.252.000 kr. |
| Mentan og frítíð | 25.311.000 kr. |
| Sosial og heilsumál | 46.897.000 kr. |
| Barnaansing | 105.047.000 kr. |
| Aðrar útreiðslur | 57.730.000 kr. |
| Reguleringskonto | 3.000.000 kr. |
| Íløgur | 98.000.000 kr. |
| Lánsgjøld og grunnar | 8.590.000 kr. |
| Tilsamans | 517.477.000 kr. |

**Inntøkur:**

| | |
|---|---|
| Rentuinntøkur | 2.000.000 kr. |
| Traðir og økir | 3.000.000 kr. |
| Skattainntøka | 512.477.000 kr. |
| Tilsamans | 517.477.000 kr. |

Tað vil siga, at Heðin Mortensen hevur samtykt, at tað skal kosta góðar 517 mió.kr. at reka Tórshavnar Kommunu komandi ár. Sami Heðin sigur, at skattalógin sigur púra greitt, at bert tað, sum tað kostar at reka kommununa kunnu vit krevja inn í skatti, hvørki meira ella minni!

**Fyrsti forklálingstrupulleikin.**
Tað er fakta, at kommunan fær afturgoldið 22 mió. kr. úr kommunala veðhaldsgrunninum og at hesin peningur verður tøkur í kommunukassanum komandi ár. Hesar 22 mió. kr. eiga at leggjast afturat inntøkusíðini, so at veruligu inntøkurnar verða 539 mió. kr. Útreiðslurnar verða 517 mió. kr., so nú leypa 22 mió. kr. av. Kortini krevur kommuna hesar 22 mió. kr. inn í skatti frá borgarunum, hví? Skattalógin er greið: Bert krevja inn tað, sum kommunan skal brúka!



**Næsti forklálingstrupuleikin:**
Heðin Mortensen sigur tað vera lættisoppur at lova skttalætta, uttan av vísa hvar peningurin skal koma frá. Minnilutin hevur ikki lova nakran skattalætta, men hevði uppskot um at varveita verandi skattaprosent. Eisini vístu vit á, hvussu tað kundi lata seg gera og er okkara uppskot skrivað í fundarbókina, so har kan Heðin lesa tað svart uppá hvítt.

Í fundarbókini stendur:
*Minnilutin Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Bjarti Mohr, og Inga Dahl, vísir á, at nú skattainntøkan er mett at hækka, og at skuldin mest sum er goldin, og kommunan fær afturrindað nógvan pening úr kommunala veðhaldsgrunninum, eiga hesir faktorar at koma borgarunum í Tórshavnar Kommunu til góðar. Hetta kann gerast við ikki at hækka verandi skattaprosent á 18.75 % og við at varveita verandi barnafrádrátt á 5.000 kr.*

*Við hesum grundgevingum mælir minnilutin til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2006 við hesum broytingum:*

*At afturrindan úr kommuna veðhaldsgrunninum verður inntøkuførd við 22.000.000 kr., at lækka íløgurnar við 1.777.000 kr. til 96.223.000 kr. og at áseta skattaprosentið til 18.75 % og Barnafrádráttin til 5.000,00 kr.*

Heðin Mortensen skrivar um Jólakalendaran hjá Jan, har minnilutin vil sleppa at lata lúkur upp fyri at geva skattlætta í jólagávu til fólki. Støðan er tíverri beint øvut. Tað er núverandi borgarstjórin, sum krevur óneyðuga nógvan skatt inn frá fólkinum, so at hann kann geva stórar jólagávur, sum onnur hava goldið fyri. Nógv húski hava tað tungt fíggjarliga, serliga tey við teimum lágu inntøkunum, og var landsskattlættin ætlaður teimum. Men nýkonverteraði javnaðarmaðurin Heðin Mortensen vildi eisini hava landsskattalættan konverteraðan í kommunukassan.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.